betri

# Treytir fyri íløgurøkt

**Avtala um íløgurøkt**
Kundin ger skrivliga avtalu um íløgurøkt við Betri Banka. Avtalan og hesar treytir fyri íløgurøkt lýsa mest týðandi rættindini og skyldur í íløgurøktaravtaluni.

**Fulltrú**
Kundin hevur í avtaluni givið Betri Banka fulltrú at umsita virðisbrævagoymslu kundans og íløgu-kontu, ið er knýtt at hesari. Hetta merkir m.a., at Betri Banka er heimilað at leggja um goymsluna og gera enduríløgur av innistandandi á omanfyri nevndu kontu.

Betri Banki hevur ikki skyldu at umboða kundan á aðalfundum í teimum feløgum, sum kundin eigur virðisbrøv í. Fulltrúin til Betri Banka gevur eisini bankanum rætt til at brúka ella selja tekningsrættir, at flyta inn frípartabrøv ella fáa partabrævarættir seldar og at avgera, um konvertibul lánsbrøv skulu inn-loysast við forfall ella um tey skulu umbýtast við partabrøv, og at lata virðisbrøv navnanotera.

Fulltrúin hjá Betri Banka merkir harumframt, at kundin, í tíðarskeiðnum, avtalan er galdandi, ikki hevur møguleika at fremja broytingar í goymslu og íløgukontu, uttan at hetta er avtalað millum kundan og Betri Banka

**Íløguprofilur**
Fyri at fáa íløgurøkt skal íløguprofilur kundans nágreinast. Íløguprofilurin vísir – við atliti at kundans vitan, royndum, fíggjarstøðu og endamáli við íløguni – hvørji virðisbrøv egna seg best til kundan.

Íløguprofilurin er grundaður á upplýsingar frá kunda. Betri Banki savnar upplýsingar um kundan, sum eru neyðugar og týðandi, soleiðis at Betri Banki kann meta um, hvønn kunnleika og royndir kundin hevur til peningaligar íløgur, um-framt fíggjarligu støðuna og íløguendamálið hjá kundanum. Íløguprofilurin er grundarlagið undir bankans útinnan av íløgurøktini. Kundans íløgu-endamál, íløgutíðarskeið o g váðafýsni framgongur av íløgurøktaravtaluni.

Broyttar umstøður hjá kundanum Íløguprofilurin myndar støðuna hjá kundanum, sum hon er í løtuni. Íløguprofilurin, sum er grundaður á upplýsingar frá kundanum, er grund-arlagið undir íløgurøktini, uttan so, at Betri Banki er vitandi um, at umstøður kundans eru broyttar. Henda broytingar í umstøðunum hjá kundanum, skal kundin boða Betri banka frá hesum skjótast gjørligt.

**Íløgusamansetingin**
Betri Banki ger íløgur vegna kundan, soleiðis at íløgusamansetingin avspeglar íløguprofilin hjá kundanum og tær metingar, Betri Banki hevur til marknaðin.

Betri Banki velur út virðisbrøvini, sum inngangа í íløgurøktina.

Í avtaluni um íløgurøkt verður tann íløgusaman-setingin lýst, sum er galdandi, tá avtalan verður undirskrivað.

**Tillaging av íløgusamansetingini**
Betri Banki hevur leypandi eftirlit við íløgusaman-setingini og kann leypandi skifta út virðisbrøv og tillaga samansetingina av virðisbrøvunum so-leiðis, at virðisbrævagoymslan lýkur íløgu-profilin, sum er avtalaður fyri íløgurøktina. Betri kann gera broytingar í samansetingini uttan loyvi frá kunda og uttan at kunna um hetta.

**Marknaðarbroytingar**
Broytingar í marknaðinum kunnu føra til, at íløgu-profilurin ikki altíð verður hildin. Í tílíkum føri tryggjar Betri Banki, í eitt styttri tíðarskeið, at samansetingin aftur er í samsvari við avtalaða íløguprofilin.

**Avrokning av virðisbrævahandli**
Kundin fær eina handilsnotu av hvørjum einstøkum handli. Handilsnotan inniheldur upplýsingar av týdningi fyri handilin.

**Netbanki**
Íløgurøktaravtalan krevur, at kundin hevur netbanka, har kundin hevur møguleika at síggja innihald og bókingar í virðisbrævagoymsluni.

**Rapportering**
Kundin kann fylgja við gongdini í virðis-brævagoymsluni í netbankanum. Harafturat sendir Betri Banki hálvárliga kundanum yvirlit yvir avkastið av virðisbrævagoymsluni.

Møguleiki er at fáa rapporteringar sendandi við styttri millumbili.

Samanberingargrundarlag (Benchmark) Avkastið av íløgurøktini verður hildið upp ímóti einum samanberingargrundarlagi. Tískil fær kundin møguleika at síggja ella samanbera avkastið við marknaðaravkastið generelt. Benchmarkið er tilskilað í avtaluni (fylgiskjal A).

**Altíð ein váði:**
Allar íløgur kunnu hava vinning ella tap við sær. Váðin veldst m.a. av tí váðafýsni, sum framgongur av íløgurøktaravtaluni.

Tilráðingin hjá Betri Banka er grundað á tær metingar, sum bankin væntar av framtíðar kursgongdini. Avkast- og ella ein kursgongd frá íløgunum í avtaluni kann verða negativ. Váðin fyri tapi av-hongur av íløguprofilinum hjá kundanum.

Áður stafest tap ella vinningur kann ikki nýtast sum álítandi ábending fyri avkast ella kursgongd í framtíðini

**Váðamerking av íløgum**
Virðisbrøv eru váðamerkt sambært »Bekendt-gørelse for Færøerne om risikomærkning af investerings- produkter« frá 16. mars 2012. Nærri upplýsingar um váðamerking av ymiskum íløgum, og hvussu hesar eru uppbýttar í grønar, gular og reyðar váðamerkingar, eru at finna á heimasíðu bankans.

**Tøkur peningur**
Serlig íløgukonta verður stovnað og knýtt at avtaluni. Íløgukontan verður nýtt til møgulig innskot av reiðum peningi, savnan av møguligum íløguavkasti, avrokning av íløgum og rindan av kostnaði.

Betri Banki kann selja virðisbrøv fyri at fáa reiðan pening til gjald av t.d. kostnaði, sum er tengdur at avtaluni.

**Innskot av nýggjum íløgupeningi**
Kundin kann við fráboðan uppá 1 bankadag seta meiri pening á íløgukontuna. Peningurin verður støðlaður sambært íløguprofili kundans. Betri Banki kann loyva sær at bíða við at keypa fleiri virðis-brøv, inntil ein nýggj dagføring er gjørd av verandi íløguprofili.

**Áheitan um sølu av virðisbrøvum**
Kundin kann, eftir avtalu við Betri Banka, selja virðisbrøv úr goymsluni fyri at fáa reiðan pening til vega. Betri Banki kann loyva sær at bíða við søluni, inntil ein nýggj dagføring er gjørd av verandi íløguprofili.

**Ómaksgjald/kostnaður**
Kundin rindar ávíst gjald fyri íløgurøktaravtaluna.

Fyri handil við virðisbrøvum, rindar kundin handilskostnað og goymslukostnað.

Yvirlit yvir kostnað av virðisbrøvum er at síggja á heimasíðu bankans.

Allir kostnaðir, ið eru knýttir at avtaluni, verða bókaðir av íløgukontuni.

Umboðsgjald og ÁKP (árligur kostnaður í %)
Við atliti til at økja um dygdina á teimum tænastum, sum Betri Banki veitir kundanum, hevur Betri Banki avtalur við nøkur íløgufeløg, soleiðis at Betri Banki kann brúka teirra íløguprógv sum íløgu- aktiv. Betri Banki fær samsýning frá íløgufeløgun- um, ið samstarv er við.

Á heimasíðu bankans finnast upplýsingar um hesi íløgufeløg. Til ber altíð hjá kundanum at fáa fleiri upplýsingar hesum viðvíkjandi.

Á árliga goymsluyvirlitinum finnast upplýsingar um ÁKP og umboðsgjøld fyri øll donsk íløguprógv, sum kundin hevur í goymslu pr. 31.12.

**Íløgukunning**
Øll íløgufeløg skulu vísa skjalið »Høvuðsíløgukunning« á teirra íløguprógvum. Skjalið skal lýsa innihald, avkast, váða og kostnað á teimum einstøku íløguprógvunum. Í sambandi við møguliga íløgurøktaravtalu, skal Betri Banki vísa kundanum skjølini fyri tey íløguprógv, sum eru við í avtaluni.

**Uppsøgn**
Kundin kann skrivliga og uttan ávaring siga upp avtaluna um íløgurøkt. Tó hevur hann skyldu at virða óavgreiddar handlar/bókingar.

Verður avtalan uppsøgd, gevst Betri Banki at eftir- hyggja íløgurnar. Hereftir ræður kundin yvir virðisbrævagoymsluni.

Betri Banki kann skrivliga uppsiga avtaluna við eini tíðarfreist uppá ein mánað. Uppsigur Betri Banki avtaluna, skulu partarnir semjast um, hvat gerast skal við íløguaktivini í goymsluni

**Avtalan um íløgurøkt endar**
Røktin steðgar beinanvegin, tá Betri Banki fréttir, at kundin er deyður, farin á húsagang, ella endar í búviðgerð.

**Við deyða**
Doyr kundin, gevst Betri Banki at umsita avtaluna. Virðisbrævagoymslan verður síðani umsitin eftir áheitan frá rætta loyvishavara.

**Skattlig viðurskifti**
Í sambandi við og sum ein liður í ráðgevingini, tosar Betri Banki, í tann mun tað er neyðugt, við kundan um ymisk vanlig skattaviðurskifti, sum kunnu gera seg galdandi fyri tær íløgur, sum avtalan umfatar. Kundin eigur tó at verða varugur við, at hesi viðurskifti eru tengd at kundans egnu støðu, og kann henda støða broytast við tíðini. Betri Banki mælir til, at kundin leitar sær ráðgeving aðrastaðni hesum viðvíkjandi. H etta kundi verið hjá grann-skoðara ella beinleiðis við Taks.

**Endurgjaldsábyrgd**
Endurgjaldsábyrgdin hjá Betri Banka framgongur av vanligu viðskiftatreytum bankans.

**Broytingar**
Broytingar av hesum treytum og fráboðan um broytingar verða gjørdar samsvarandi vanligu viðskiftatreytum bankans.